# handVERKARIN

4. ÁRSFJÓRÐINGUR 2006 BLAÐ NR. 21 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Gev gætur

Niðanfyri eru nevnd nøkur viðurskifti, sum hava týdning fyri felag og limir.

## EFTIRLØN

Frá 1. oktober 2006 er eftirlønargjaldið 12%, arbeiðsg./meistari rindar 10% og limur 2%.

## SJÚKRAGRUNNURIN BATI

Sjúkragrunnurin Bati er bert fyri tímalønt. Mánaðarlønt fáa løn, tá tey eru sjúk. Umsóknin skal vera Bata í hendi í seinasta lagi 10. sjúkradagin.

Handverkarin rindar 15 oyru og meistarin rindar 30 oyru av hvørjum tíma í grunnin.

## EFTIRÚTBÚGVINGARGRUNNUR

Handverkarar og meistarar gjalda 10 oyru av hvørjum tíma í eftirútbúgvinggrunnin VITIN. Grunnurin letur stuðul, tá handverkarar fara á skeið. Í fyrsta umfari fæst vanliga dagpeningur frá skúlanum. Hetta verður endurgoldið eftir skeiðið. Ferðaútreiðslur verða afturgoldnar sambært kvittan fyri ferðaseðil/seðlar.

## LÍVSTRYGGING

Limir felagsins eru lívtryggjaðir. Ein treyt fyri at fáa útgjald er, at limagjald ikki er í eftirstøðu. Best er tí at gjalda limagjald við fastari flyting.

Umráðandi er at limir boða frá, tá broytingar eru í limastøðuni.

## LØNARSEÐLAR, EFTIRLØN V.M.

Saman við lønarútgjalding skal vikuseðil fylgja við. Tað er umráðandi at handverkarin sjálvur fylgir væl við lønargjaldi og at eftirlønin er røtt (%) og at hendan verður flutt til Grunnin.

## HVÍLANDI LIMIR

Hvílandi limir gjalda 200,00 kr. um árið, og so fáa teir blaðið „Handverkarin", um teir ynskja tað.

## P-TØL, ADRESSUR V.M.

Tað er umráðandi, at felagið hevur P-tøl og rætta adressu hjá limunum.

## TÍMALØN

Tímalønin er kr. 113,69

**Innihaldsyvirlit:** **síða**


Íslendsk byggilist í Føroyum 3
Nýggir møguleikar í Føroyum 4
Kirkjustaðurin úti á Reyni í Havn 5
Nevndarlimir og dagligur leiðari 30



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Evstamark til komandi blað er 20. februar 2007 · **Blaðið er prentað: 20. desember 2006**
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 · Fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo. · www.handverk.fo

# Íslendsk byggilist í Føroyum

**J. P. Gregoriussen, arkitektur, sigur í bókaverkinum Kirkjur í Føroyum: „Tornið á gomlu Vágs kirkju, sum gevur henni sín serskilda vakra dám, er eftirgerð av dómkirkjuni í Reykjavík, sum varð bygd í 1856.“ Kirkjan – suðuri í Vági – varð vígd 16. november 1862**

*Dómkirkjan í Reykjavík var bygd í 1856.*



*Kirkjan á Kirkjukletti í Vági varð vígd í 1862. Tornið er meinlíkt dómkirkjuni í Reykjavík.*



Í 1862 kom ungur íslendingur, Guðbrandur Sigurðsson, til Føroya. Sagt hevur verið, at hann helst ikki hevði ætlað at steðga leingi í Føroyum, men mangt kom at laga seg øðrvísi. Guðbrandur var byggikønur maður, sum tørvur tá var á í Føroyum.

J. P. Gregoriussen, arkitektur, sigur um Guðbrand, at hann eigur bróðurpartin, tá ræður um kirkjubygging í Føroyum, í seinri helvt av 19. øld, serliga sæð frá einum byggilistarligum sjónarmiði.

## Í læru hjá Jakob Sveinsson

Guðbrandur stóð í læru, og búði eisini, hjá kenda íslendska byggimeistaranum Jakob Sveinsson í Reykjavík, har hann var avlærdur í 1858.

Hann keypir hús í Reykjavík, og er í 1860 giftur við Sigriður Guðmundsdóttir, og eiga tey tá sonin Thorstein.

Lærumeistari hansara, áður nevndi Jakob, fór til Keypmannahavnar í 1847, 16 ára gamal at standa í læru.

*… framhald á síðu 16*

*Danial Pauli Djurhuus, form. Landsfel. Handverkaranna:*

# Globalisering: Nýggir møguleikar í Føroyum



**Á várið 2006 vendu umboð fyri Tórshavnar Skipasmiðju sær til Landsfelag Handverkaranna í sambandi við, at ein nýbygningur var í umbúna.**

Talan var um eitt supply-skip til føroyskt reiðarí. Sum tey flestu vita, eru ikki nógvir nýbygningar latnir av okkara skipasmiðjum seinastu árini.

## Serligar umstøður

Undir vanligum umstøðum hevði skrokkurin til skipið verið gjørdur í útlandinum, og síðani sleipaður til Føroya og liðugtgjørdur her.

Støðan var nú tann, at ikki var møguligt at gera skrokkin uttanlands, orsaka av plásstroti á skipasmiðjunum. Ein pólsk skipasmiðja vildi tó senda fólk Føroya at gera skrokkin.

Fyri at hetta kundi lata seg gera, var neyðugt at fakfelagið á økinum kundi taka undir við eini slíkari ætlan. Tí vendu umboð fyri Tórshavnar Skipasmiðju sær til Landsfelag Handverkaranna.

## Onki órógv

Nevndin í Landsfelag Handverkaranna viðgjørdi fyrispurningin frá Tórshavnar Skipasmiðju, og skjøtul varð settur á samráðingar millum partarnar. Tað hevði avgerandi týdning fyri Landsfelag Handverkaranna, at nøkur grundleggjandi viðurskifti vórðu tikin við í eina møguliga avtalu, og at verandi sáttmáli á økinum ikki varð órógvaður av avtaluni.

## Gjørdu avtalu

Samráðingarnar millum partarnar gingu væl, og ein avtala varð undirskrivað. Avtalan er galdandi í fýra ár.

Pólskir stálskipasmiðjir/sveisarar kundu nú koma til Føroya at byggja sjálvan skrokkin. Arbeiði, sum fyrr varð gjørt í Pólandi, kundi nú gerast í Føroyum. Pólska skipasmiðjan sendir arbeiðsmegi til Føroya til eina avmarkaða uppgávu. Restin av arbeiðinum verður gjørt við føroyskari arbeiðsmegi.

*… framhald á síðu 31*

*Arne Thorsteinsson, fyrrv. landsantikvarur:*

# Kirkjustaðurin úti á Reyni í Havn



**Vanliga verður hildið, at kirkja hevur ikki verið í Havn fyrr enn 1609, tá vit vita, at kirkja varð bygd úti á Reyni.**

**Tó skulu Suðurstreymoyar prestar hava búð í Havn síðan trúbótina.**

Gitt hevur tí verið, at guðstænasta hevur verið hildin í Munkastovuni, áðrenn kirkja varð bygd í 1609. Henda uppfatan gongur aftur til bók N. Andersens frá 1895. Sverri Dahl hevur verið í iva, men eins og flest øll onnur góðtekur hann tó, at eingin kirkja hevur verið í Havn fyri 1609, „tað vit vita".

Sjálvur havi eg ongatið góðtikið hetta sjónarmið, og fari eg her at royna at greiða frá hví.

At kirkja ikki hevur verið nevnd í skrivaðum skjølum undan 1609 er ikki prógv fyri, at eingin kirkja hevur verið í Havn framman undan.

Mangt er, sum ikki er nevnt í skjølum, men hevur verið til kortini.

## Af ny opbygge?

Áskoðan N. Andersens, at kirkjan, ið bygd varð í 1609, var fyrsta kirkjan í Havn, byggir á talvu, sum skal hava hingið í kirkjuni.

Talvan, sum ikki er til longur, skal hava verið úr svartmálaðum eikiviði og áskrivað við gyltum bókstøvum. Teksturin var hesin: „ANNO 1609 LODT



*Á myndini, sum er frá 1778 sæst, at 1609-kirkjan, úti á Reyni, var smíðað sum stokkastova. Seinni varð kirkjan klødd við borðviði; vertikalt. Men hetta er ikki, sum áður mett, fyrsta kirkjan í Havn.*

KONG: MAY: FOUGDT STRANGE MADZEN B*RGER UDI KJØBENHAFFN DENNE KYRCKE AFF NY OPBYGGE. LAVS DEO. FECIT MIHI MAGNA. S.M.G. QVI POTENS EST.“

Orðingina „aff ny opbygge“ hevur N. Andersen fatað sum bygd á staði, har eingin kirkja var framman undan. Hetta samsvarar tó ikki við vanliga týdningin av hesi orðing, sum mangan verður funnin aftur seinri.

## Endurbygging

Í 1683 lat Sandoyar prestur Skúvoyar kirkju „af ny opbygge“, „da den ganske var forfalden“. Um Viðareiðis kirkju verður sagt í 1709: „Kirken nylig opbygget, siden den forrige kort tilforn af Søbrænding blev nedbrudt,“ og í 1743 verður um Havnar kirkju sagt, at „det ganske af ælde forfaldne Taarn er af nye opbygt forleden Aar 1742“.

Mong onnur dømi kundu verið funnin, men hesi munnu vera nóg mikið til at sýna, at heldur enn at benda á, at eingin kirkja var framman undan, er orðingin „af ny opbygge“ ein føst vending, ið merkir „endurbyggja“. Júst henda orðing eigur tí at verða tikin sum prógv fyri, at kirkja var í Havn undan 1609.

*Í kirkjuni, sum varð bygd úti á Reyni í 1609, var ein talva, sum ikki er til longur. Á talvuni stóð m.a. "AFF NY OPBYGGE".*
*Hetta hevur verið misskilt soleiðis, at mett var, at fyrsta kirkjan í Havn varð bygd í 1609.*




## Kirkja í Havn tíðliga í miðøld

Talvan frá 1609 er elsta skrivaða heimild um kirkju í Havn. Nær fyrsta kirkjan varð bygd úti á Reyni fáa vit sostatt ikki at vita úr skrivaðum keldum. Hetta er tað vanliga.

Tað er bert hendinga kirkja, sum er nevnd í skrivaðum keldum eldri enn 1600 árini. Men hóast tað, meta vit flestu kirkjur í Føroyum at vera bygdar tíðliga í miðøld av fyrstu tíð, og hví so ikki eisini Havnar kirkja ?

Sum útgangsstøði má tí verða mett, at á kirkjustaðnum úti á Reyni hevur kirkja staðið síðan tíðliga í miðøldini. Henda meting kann eisini verða stuðlað av øðrum heimildum.

## Legsteinar

Í 1893 vóru tveir legsteinar, sum lógu í gamla kirkjugarðinum úti á Reyni, tiknir upp og fluttir inn í Havnar kirkju, sum nú er. Teir standa hvør síni megin altarið upp móti eystara kórsveggi. Annar steinurin hevur ligið yvir grøvini hjá Hans Rasmussøn, sum var Suðurstreymoyar prestur frá 1630 til hann doyði í 1651. Hetta vita vit frá innskriftini á steininum, sum annars er ein ferhyrntur kálksteinur, 183 cm langur, 119 cm breiður og 11 cm tjúkkur.

## Steinur við skjaldarmerki

Hin steinurin er 7 cm tjúkkur skifursteinur. Hann er 168 cm langur. Ovari endi er sneiddur upp í ein spísk.

Steinurin er 51 cm, har hann er breiðastur. Haðani smalkar hann niðureftir til hann er 21 cm um niðara enda. Í steinin er niðan eftir miðjuni høgdur 4 cm breiður krossur, ið stendur á fóti og gongur heilt upp í spíssin.

Ovari partur við krossørmunum er

dánaður sum fýra symmetrisk liljubløð. Í steinin er eisini høgt eitt kámt skjaldarmerki, 17 x 15 cm stórt. Eingin innskrift er annars á steininum.

## Søgn um steinin

Sagt verður, at hesin steinur skal hava ligið yvir grøvini hjá Lucasi Debes, sum var Suðurstreymoyar prestur frá 1652 til hann doyði í 1675. Hetta kann tó vera git og ber ikki til at staðfesta við vissu, tó at skjaldarmerkið tykist at stava frá 1500-1600 árunum.

Men legsteinurin sjálvur er munandi eldri enn skjaldarmerkið. Steinurin er í skapi og prýði við liljukrossi eyðkendur fyri romanska tíð og er sostatt ikki yngri enn 1200 árini. Slíkir einfaldir, navnleysir legsteinar, bert við krossi á flatuni eru vanligir um øll Norðurlond í romanskari tíð.

## Skjaldramerki kanska øldir seinri

Kanska var tað Lucas Debes, sum øldir seinri fekk skjaldramerki sítt høgt í henda romanska stein. Vit vita tað ikki, men tað sum hevur størri týdning er, at tað vit við vissu vita er, at hesin steinur hevur verið í kirkjugarðinum úti á Reyni. Tær gitingar, sum førdar hava verið fram, at steinurin skal hava verið borin úr Kirkjubø til Havnar í 1600 árunum at nýta aftur, hava sjálvandi samband við ta uppfatan, at eingin kirkja var í Havn í miðøld.

Nú vit hava fingið ávíst, at henda uppfatan byggir á mistulking, er sjálvandi einki til hindurs fyri at trúgva tí trúligasta, at legsteinurin hevur verið í kirkjugarðinum úti á Reyni síðan hann varð tilevnaður og lagdur yvir eitthvørt leiði har úti einaferð í teimum fyrstu kristnu øldunum.

## Doypifuntur í Nýggjustovu

Á Føroya Fornminnissavni er ein doypifuntur úr fitisteini, sum er komin úr „Hammershaimbsgarði“ í Havn í 1930. Funturin er ferhyrntur, 78 cm langur, 53 cm breiður og 35 cm djúpur. Hann er tilevnaður í Noregi og verður tíðarfestur til 1100 árini.



*Hesin steinurin stendur í dag í dómkirkjuni, og skal hava ligið yvir grøvini hjá Lucasi Debes, sum var prestur í Havn 1652-1675. Men steinurin er nógv eldri enn so, hann er í skapi og prýði eyðkendur fyri romanska tíð.*
*Sannlíkt er tí, at hann er lagdur yvir eitthvørt leiði úti á Reyni í fyrstu kristnu øldunum.*
*Teknað: J. P. Gregoriussen.*

… framhald á síðu 9

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

- ✓ *Handverksútbúgvingar*
- ✓ *Støðisútbúgving*
- ✓ *Yrkisakademiútbúgvingar*
- ✓ *Skúlaheim*



*Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051*

*www.tst.fo • tst@tst.fo*




# Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bila søluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*

*… framhald frá síðu 7*

Tað fyrsta, vit vita um henda doypifunt er, at hann uml. 1880 var at finna í Nýggjustovu í Havn, sum Hammershaimb, próstur hevði átt.

## Ikki úr Kirkjubø

Hvørji kirkju hevur hann staðið í? Tað trúligasta hevði undir vanligum umstøðum verið, at hann kom úr Havnar kirkju, men hetta heldur Sverri Dahl verða so stórt ivamál, at hann ikki himprast við at skráseta hann undir Kirkjubø, „tí at eingin kirkja var í Tórshavn í miðøld". At doypifunturin skal hava verið í Kirkjubøar kirkju til 1874 og tá førdur til Havnar saman við hinum fornlutunum úr kirkjuni, sum Sverri Dahl gitir, kann beinleiðis ávísast at vera skeivt, tí alt sum var í Kirkjubøar kirkju um tað mundi, var væl og virðiliga skrásett, og har var eingin doypifuntur úr fitisteini tá.

## Doypifuntar úr fitisteini

Slíkir doypifuntar úr fitisteini hava ikki verið óvanligir í Føroyum. Ein skráseting frá 1729 nevnir 8 slíkar funtar í føroysku kirkjunum, og at henda skráseting ikki er fullfíggjað, kann verða ávíst. Sløk 100 ár seinri, í 1819-1820, vita teir bert um 4 funtar av hesum slagi, og ein teirra varð ikki nevndur í 1729. Hvat er vorðið av øllum hinum? Fyri at fata hetta og fata, hvussu ein doypifuntur kann verða endaður í einum vanligum húsum í Havn, mugu vit líta aftur í søguna.

## Undir kav tríggjar ferðir

Í elstu kristnu tíðini var tað siður, tá børn vórðu doypt, at tey skuldu nakin undir kav tríggjar ferðir, fyrst fram eftir rommum og síðan eftir hvørji lið. Tí eru hesir doypifuntar so stórir. Sum frá leið, broyttist hesin siður, og tá komið var út í seinmiðøldina, vóru teir flest alla staðni farnir at oysa vatn á høvdið á

*… framhald á síðu 12*

***Kirkjustaðurin út á Reyni***
*Kirkjan, sum varð bygd úti á Reyni í 1609, stóð frammanfyri hesi húsini. Vinstrumegin á myndini er Leigubúðin og høgrumegin Munkastovan.*




Ein góð byrjan
Er grundarlagið í lagi? Timburhandilin og 2x3 ynskja at bjóða tær eina góða byrjan við einum breiðum og góðum úrvali av Mascot arbeiðsklæðum og DeWALT amboðum.
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir
PÓLAR


Netbóking
keyp tína ferð tá tað passar tær...
Tað er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways.
Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil.
Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.
Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club.
VISA
EUROCARD
MasterCard
ATLANTIC AIRWAYS
Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum
www.atlantic.fo
www.sansir.fo

*… framhald frá síðu 9*

barninum. Hesir ovurstóru doypifuntarnir vórðu tí lítið brúktir, og í staðin fingu kirkjurnar dópsføt. Vit kunnu hyggja eitt sindur nærri at teimum funtum, vit vita um.

## 4 doypifuntar

Doypifuntarnir úr Sumbiar og Nes kirkjum vórðu fyrstu ferð umrøddir í 1729. Teir vóru báðir tiknir úr kirkjunum og sendir til Oldnordisk Museum í Danmark í 1820, tí teir ikki longur vórðu brúktir. Eisini varð funturin úr Sandavágs kirkju sendur til Danmarkar í 1820, men hesin funtur hevur ikki verið nevndur í skjølum áður.

Fjórði funturin, sum til var um 1820 stóð í Sands kirkju, og har varð hann standandi til hann í 1930 kom á Føroya Fornminnissavn. Hann varð nevndur bæði í 1709 og 1729.

## Nólsoyar kirkja

Nólsoyar kirkja hevði ein doypifunt úr fitisteini. Hann varð nevndur í 1729 og so ikki aftur. Í 1916 varð hann afturfunnin úti á kirkjugarðinum, tá grivið var fyri eini grøv. Sum skilst hevur hann verið tikin út úr kirkjuni í sambandi við at nýggj kirkja varð bygd og er so endaður í eini lægd í kirkjugarðinum, har hann síðan er farin undir heilt. Hann varð latin Føroya Fornminnissavni í 1930.

**Dópsfuntur**

*Tá børn vóru doypt skuldu tey nakin undir kav tríggjar ferðir, fyrst fram eftir rommum og síðan eftir hvørji lið. Doypifuntarnir vóru tí stórir; hesin 78 cm langur, 53 cm breiður og 36 cm djúpur.*



## Hjallstrappusteinur

Miðvágs kirkja hevði ein funt í 1729, og er hann ikki síðan nevdur. Í 1931 eru fýra samanhoyrandi brot av einum fitisteinsfunti latin Føroya Fornminnissavni. Hesi brot hava ligið í eini hjallstrappu hjá bóndanum á Ryggi í Miðvági og vórðu hildin at verða skírnarfat úr Miðvágs kirkju.

Í Hvalbiar og Vestmanna kirkjum vóru fitisteinsdoypifuntar í 1729. Síðan er einki frætt til teirra.

Í Kirkjubøar kirkju var ein funtur í 1709. Hann varð aftur nevndur í 1729 og fyri seinastu ferð í 1742.

## Dópsfunturin í Havn

At enda skal funturin úr Havn verða umrøddur. Ilt er at síggja, at hesin funturin skal vera komin júst úr Kirkjubø. Er hann ikki úr Havnar Kirkju, kundi hann tað sama verið úr Hvalbiar ella Vestmanna kirkjum ella onkri heilt aðrari. Men hví skuldi hann ikki verið úr Havnar kirkju? Sum vit hava sæð heldur grundgeving Sverra Dahls, at eingin kirkja var í Havn í miðøld, ikki. Trúligast er tí, at doypifunturin úr Havn er úr Havnar kirkju, og ein orsøkin til, at hann ikki er nevdur í skjølum, kann verða at hann longu í 1600 árunum ella fyrr kann vera tikin úr kirkjuni. Her er vert at minna á, at dópsfatið í Havnar kirkju frá

1601 kanska er tað elsta vit eiga, og at ikki hevur verið brúk fyri fitisteinsfuntinum eftir at tað kom í kirkjuna.

## Kenna 10 slíkar funtar

Tá steinfuntarnir vórðu umrøddir á skrift í 1700 árunum høvdu teir sostatt ikki tænt teirra upprunaliga endamáli í øldir. Vit hava nú kunnleika til 10 slíkar funtar í Føroyum. Hvussu mangir teir hava verið í føroysku kirkjunum í miðøldini, er ógjørligt at siga, helst munandi fleiri enn teir, vit vita um. Hesir eru so við og við horvnir úr kirkjunum, blakaðir út á kirkjugarðin ella onkra aðra staðir sum so mangir aðrir gamlir, óbrúkiligir lutir. Í tí sambandi eiga vit ikki at gloyma, at áhugin fyri fornlutum er rættuliga nýtt fyribrigdi. Onkur hendinga serskøltur kann hava havt áhuga fyri at goyma slíkt, men millum manna er hesin áhugin so smátt farin at vakna síðst í 1800 árunum í fyrsta lagi. At vit „altíð“ hava ansa væl eftir tí gamla, sum onkur vil vera við, er ein myta.Tað er tí at undrast yvir, at tað hóast alt enn vóru so mangir fitisteinsfuntar til í 1700 árunum, og at ikki færri enn 7 funtar framvegis eru varðveittir á Føroya Fornminnissavni og á Nationalmuseet í Danmark.

## Havnar kirkja – kirkja Føroyinga?

Tann kirkjan, sum bygd varð í 1609 var úr heilum stokkum, 24 $^{1}/_{2}$ alin long og 10 alin breið innan, umframt forkirkju, 7 alin long, undir torninum í vestara enda. Í skipinum vóru 13 bríkar hvørjumegin. Kirkjan var 9 $^{1}/_{2}$ alin høg, og í vestara parti var loft við 6 bríkum.

Havnar kirkja hevur tá kunna rúmað eini 150 fólkum og var um hetta mundi nógv tann største kirkjan í landinum og



*Dópsfatið, ið er tíðarfest til 1601. Í dag er tað í dómkirkjuni, og er kanska tað elsta vit eiga.*

hartil nógv tann best útgjørda við gripum og ognum.

Sverri Dahl undrast, tí tá vóru einans 100 fólk í Havn, metir hann. Undrunarvert er tað eisini, at kongur letur tilfarið til kirkjuna, og at tað er fútin, sum letur kirkjuna byggja. Er tað kanska so, at Havnar kirkja als ikki var ein vanlig sóknarkirkja?

## Kongur gevur boð

Í skrivi til lensmannin á Bergenshus 22. juni 1609 gevur kongur boð um, „at lade dem paa Færø bekomme noget Tømmer til deres Kirkes Bygning – –“. Her er sjálvandi talan um Havnar kirkju, sum stóð liðug longu sama ár, men hví nýtir kongur orðini „dem paa Færø“ í hesum sambandi? Kanska er tað at leggja ov nógv í hesa orðing, men av tí at kongur og fúti hansara eru so nógv uppi í kirjubyggingini, fær ein varhugan av, at Havnar kirkja ikki hevur verið nøkur vanlig kirkja, men hevur havt onkra serliga støðu í landinum.

… framhald á síðu 24

HÚSASMÍÐ
Finnur Simonsen
tel. 31 45 49 - 51 45 49 - fax 31 83 81

Málarameistararnir
FALKENBERG
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny



SKIPASMIÐJAN
www.faroeyard.fo


sansir.fo

# Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

Vit veita ráðgeving í tryggum og hugnaligum umhvørvi

SUÐUROYAR SPARIKASSI
*www.sparsu.fo, Tel 35 98 70*



… framhald frá síðu 3

Átta ár seinni er Sveinsson aftur í Íslandi, men hevði tá, umframt at hava verið í Danmark, eisini verið í Fraklandi og fingið sær útbúgving. Sigast kann av sonnum, at Guðbrandur var í góðum hondum, tí Jakob Sveinsson mettist millum kendastu byggimeistarar í Íslandi.

Húsini, hann bygdi sær í 1860, vóru fyrstu tvíhæddaðu húsini á staðnum. Tey standa framvegis uppi í gamla Reykjavík. Hann stóð eisini fyri umvælingini av dómkirkjuni í Reykjavík í 1879.

## Byggir sær hús á Tvøroyri

23. mars 1862 kemur Guðbrandur Sigurðsson við postskipinum Arcturus til Føroya.

17. mai – sama ár – koma eisini konan, sonurin og vermamman higar við sama skipi. Tey búgva fyrstu árini í Havn, men í 1872 verður flutt suður á Tvøroyri. Har byggir Guðbrandur sær hús á staðnum har býráðshúsini nú á døgum standa.

*Guðbrandur byggir sær í 1872 hús á Tvøroyri, har býráðshúsini nú standa.*



## Kirkjan á Kirkjukletti í Vági

Beint sum Guðbrandur er komin til Føroya verður hann av Holten, amtmanni sendur suður til Vágs at standa fyri bygging av nýggjari kirkju á Kirkjukletti. Tað er hon, sum í 1942 verður flutt til Hovs og tíbetur nú stendur at kalla uppi í sama líki, sum Guðbrandur bygdi hana, og sigast kann við lít, at tað er stórt álit at vísa 28 ára gomlum, fremmandum manni.

Hann kann hava havt við sær góð viðmæli frá meistara sínum, og sum kunnugt var íslendingurin Hannes Finsen fúti í Føroyum um hetta mundið.

## Eit satt listaverk

Kirkjan, ið Guðbrandur byggir í Vági, er eitt satt byggilistarverk, og hon hevur týðilig og sjónsk nýklassisk árin, serliga tríhyrntar „tymphonir" oman fyri vindeygu og úthurðar. Hon verður útgjørd við veruligum rundum hválvi, sum er sundurbýtt í puntar við blonkum stjørnum í miðjuni. Hesin siður var vanligur í íslendskum kirkjum tá, og kirkjan er eisini átøk íslendskum kirkjum, ið vórðu bygdar um hetta mundið. Ein teirra er Reykhólar kirkja í Reykhólasveit frá 1856. Tornið á gomlu Vágs kirkju, sum gevur henni sín serskilda vakra dám, er eftirgerð av dómkirkjuni í Reykjavík. Á síðu 3 er mynd av dómkirkjuni í Reykjavík, og kirkjuni á Kirkjukletti í Vági, ið varð vígd í 1847.

## Sivertsen og Havnar kirkja

Men Guðbrandur, sum nú er kendur undir navninum Sivertsen, gevst ikki so.



*Núverandi Havnar kirkja er bygd í 1788. Legg til merkis, at vindeyguni eru í tveimum hæddum, og at kirkjan upprunaliga hevði flagtak.*

*Havnar kirkja, eftir umbygging í 1865, sum Guðbrandur Sigurðsson stóð fyri. Tekn. I. P. Gregoriussen.*



Í 1865 verður Havnar kirkja frá 1788 heildarumbygd og hesa uppgávu fer hann eisini undir, hóast hon er sera torfør.

Stutt frammanundan hevur kirkjan, helst í 1863 fingið tekju av fløgugróti.

Hetta er sama árið, sum Nólsoyar kirkja verður bygd og fær fløgugrót á tekjuna. Fløgugrótið kemur úr Wales í Onglandi, og verður vanligt tekjutilfar í oyggjunum. Havnar kirkja hevði upprunaliga flagtekju. Tunga fløgugróttekjan verður liggjandi á meðan umbygt verður. Bitarnir verða allir sum ein sagaðir av og úrtiknir (ein biti hevur verið fyri hvørt sperrupar).

Nýggj innara syll er ísett báðumegin, og jarnspenni fest millum hesar syllar fyri hvørjar uml. 3 metrar.

## Hválvið býtt sundur í puntar

Kirkjan fær hválv, sum í erva verður vatnrættt, tí hanabitarnir forða fyri at farið verður hægri upp í boga við tí. Eins og í Vágs kirkju verður hválvið býtt sundur í puntar, blámálað og blankar stjørnur settar í miðjuna á hvørjum punti. Hetta er sjálvandi ímyndanin av sjálvum himmalinum.

Fyrimyndin til hesi puntutu hválv, bæði í Íslandi og Føroyum, er uttan iva stóra hválvið í dómkirkjuni í Keypmannahavn. Hetta hválv er múrað í ferhyrntum kasettum, sum puntarnir í okkara kirkjum er eftirgerð av.



*Havnar kirkja, sum í dag er dómkirkja, er lítið broytt síðani umbyggingina 1865. Til kirkjuumsitingina er bygt uppí kirkjuna eystureftir.*

*… framhald á síðu 20*


Jógvan Weihe
Vit seta krøv
til dygdina
trygdarhjálmar
trygdarskógvar
og tey røttu klæðini
p/f Jógvan Weihe - Stiðjagøta 10 - tel. 35 38 97 - www.jogvan-weihe.fo


TÁ ALT SKAL PASSA SAMAN
HEILDARVEITING INNAN EL-INNLEGGING, RÁÐGEVING OG PROJEKTERING
El-innleggingar
Ljós og talvur
EDV- & telefonnet
Neyðstreymur til X-felt og teldur (No-break og diesel)
Køling av X-feltum og teldurúmum (air condition og køliskipanir)
Trygging av X-feltum og teldurúmum (atgongueftirlit, innbrotsávaring, eldávaring og eldsløkking)
SISERO 351800
ELECTRIC
Hoyvíksvegur 53 • 100 Tórshavn • Tel 35 12 20 • Fax 35 12 30 • lm@lm.fo • www.lm.fo
SAMDØGURTÆNASTAN SVARAR ALTÍÐ Á TEL 35 12 20





# AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarar:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing
- **ESAB:** Elektrodir og sveisiútgerð

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

… framhald frá síðu 17

## V. Dahlerup arkitektur

Tá ið ætlanir eru frammi um at gera Kirkjubømúrin lidnan, verður V. Dahlerup arkitektur í 1864 sendur til Føroya at kanna múrin, og seinni skal hann gera uppskot til at tekja hann og byggja hann lidnan. V. Dahlerup var tá á ungum árum. Hann var bróðursonur Dahlerup, amtmann, sum tá var farin úr Føroyum. Hann var illa dámdur millum manna. V. Dahlerup hevði haraftur-ímóti vunnið stóra gullheiðursmerkið í kapping á Kunstakademinum í Keypmannahavn um eina dómkirkju í gotiskum byggistíli. Tað man vera grundin til, at hann verður sendur henda vegin, og so tað, at hann var tikin úr leikum sum teknari. Seinri gjørdist V. Dahlerup millum tátíðar kendastu arkitektar. Hann var ein sannur meistari í stílimitatión.

Uppskotið hjá V. Dahlerup verður góðkent av donskum myndugleikum og fígging fingin til vega, men semja fekst ikki millum føroyingar fyri tiltakinum. Tí varð ætlanin slept.

*Múrurin í Kirkjubø, sum V. Dahlerup arkitektur skeyt upp at fullføra hann í 1865. Tá henda ætlanin ikki fekk undirtøku, varð farið at umbyggja Ólavskirkjuna.*



## Sóknarkirkjan í Kirkjubø

Hetta er um tað mundið, tá ið Kirkjubøstólarnir verða sendir á danska tjóðminnasavnið.

Sóknarkirkjan í Kirkjubø hevur vanliga verið nevnd Ólavskirkjan, og verður hon tað fyri ein part enn – í øllum førum í sóknini. Eingi serlig prógv eru um, hví so er, og heldur ikki ber til at staðfesta, hvørt kirkjan kann hava verið vígd Ólavi kongi Heilaga.

## Munkar í Føroyum

Ólavskirkjan hevur eisini verið nevnd Munkakirkjan. Í dag meta serfrøðingar kortini ikki, at munkar hava búleikast í Føroyum. Einki prógv er um kleystur ella dómkapittul í katólskari tíð í Føroyum. Hóast onki skjalaprógv, so eiga vit her at hugsa um, at vit hava húsanavnið Munkastovan úti á Reyni í Havn.

Símin Arge, fornfrøðingar metur, at talan kann vera um at eftirtíðin hevur nýtt orðið munkur um biskupar ella prestaskapin sum heild í miðøld. Í Noregi var heitið munkur eisini nýtt um fólk, ið sóu út sum ella vóru ílatin eins og munkar, eitt nú pílagrímar. Í tí sambandinum hevur verið víst á, at kanska kunnu kappaklødd fólk hava valfarta til hesa kirkjuna í miðøldini, hvør veit.

## Trúbótin í Føroyum

Hugsað vit um trúbótina, so er eingin ivi um, at hon hevur skapt stórar broytingar í Føroyum á mongum økjum, sum vit í dag nærum einki vita um. Tað má hava verið stórhending, tá katólska kirkjan misti miklu ognir sínar um alt landið; og tí eisini misti sítt lívs- og inntøkugrundarlag.

Tað sum katólska kirkjan misti er sjálvandi komið øðrum til góðar. Inn-

tøkugrundarlagið hjá kirkjuni, var ikki so lítið; helmingurin av føroysku jørðini, tað sum vit í dag nevna kongs.

## Guðbrandur og Holten

Í 1874 bað Holten, amtmaður, Guðmund Sigurdsson sýna Ólavskirkjuna í Kirkjubø og gera eina kostnaðarmeting við tilboði fyri at umvæla hana. Tilboð hansara er dagfest 25. mars 1874, og hin 26. mars sendir Guðmundur rokning fyri 10 daga langa ferð, hann tá hevði gjørt úr Suðuroy til Kirkjubøar.

Tilboðið ljóðaði uppá 2332 ríkisdálar. Men hetta er tó ikki endaligi kostnaðurin fyri umvælingina, tí viðmerkt er á tilboðið, at gerð av eitt nú torni, tróðri, umframt arbeiði upp á veggirnar og eysturskjøldrinum, eru ikki íroknað.

## Guðbrandur og Ólavskirkjan

Tikið var kortini av tilboðnum, og farið varð beinanvegin undir fyrireikingarnar, eitt nú at fáa tilfar úr Havn til Kirkjubøar.

Hetta er bygging í nýgotiskum stíli við lít, stór oddbogaði vindeygu, sera spískt og høgt torn í tveimum hæddum og stórt oddbogað hválv hongt upp undir sperrurnar.

Guðbrandur stendur fyri hesum arbeiði, eingin ivi um tað. Tað menn vistu, var tað V. Dahlerup, ið teknaði kirkjuna.

## Umbygging í 1960'unum

Í 1960 árunum varð Ólavskirkjan í so ringum standi, at neyðugt varð at gera stórar umvælingar. Umsókn varð tá send danska kirkjumálaráðnum um fíggjarligan stuðul. Byggiætlanin mátti tí leggjast fyri danska tjóðsavnið til góðkenningar.



***Ólavskirkjan 1874***
*Ólavskirkjan í Kirkjubø eftir umbygging í 1874, sum Guðbrandur skipaði fyri.*

## Kirkjumálaráðið lat ikki stuðul

Í skrivi til kirkjumálaráðið 16. mai 1962 mælir Aa. Roussell, yvirsavnsvørður frá at fara undir ætlanina, men heldur varðveita og ístandseta kirkjuna í sama líki sum V. Dahlerup teknaði hana, herundir eisini innibúnaðin.

Ráðini hjá danska tjóðminnasavninum vórðu ikki fylgd, men varð kirkjan við gomlu føroysku trækirkjunum sum fyrimynd og í nógvum øðrum lutum førd aftur til upprunalíki, so vítt hetta fornfrøðiliga læt seg gera. Tað bar ikki til hjá kirkjumálaráðnum at lata stuðul



***Ólavskirkjan í dag***
*Ólavskirkjan var seinast umbygd og endurvígd 3. september 1967. Elstu partarnir av kirkjuni eru frá 1100 talinum.*

*… framhald á síðu 26*

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Henning Sørensen
MÁLARAMEISTARI
TEL. 31 47 87 & 21 89 31





VINDEYGUNI SIGA ALT

**HDYGD umfatar ymsar vørur:**

- vindeygu
- altanhurðar
- úthurðar

**Úr ymsum tilfari:**

- træ
- træ/alu
- plast

**Við ymsum funktiónum:**

- toppsving
- síðusving
- síðuhongd
- topphongd

**Við 10 ára trygd:**

- døgg millum rútarnar
- rotskaðum (treytað av at vit mála liðugt)
- at viðurin skjýtur seg og fer sundur í lamineringini
- funktiónsfeilum á besløgum

REPROZ

HDYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

**rør-tænastan**

Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

*Eyðfinn Hansen*
*í Geilini 5*
*FO-175 Kirkjubøur*
*Faroe Islands*
*tel./fax: +298 32 81 80*
*fartel.: +298 22 81 80*
*e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo*

elmek

**v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn**
**tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo**

**Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl**

**BAXI** KETIL



BALTIC CS
18-25Kw

Sera orkusparandi
ketil frá BAXI.

CE góðkendir.
DS/ISO 9001
góðkendir.

Við kappa til
oljufýr

Ein tann mest orku-
sparandi ketil á føroyska
marknaðinum.

Síggj kanningina
á www.sparolie.dk

**Tórshavn:**
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11

**Vágur:**
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65



demich

*… framhald frá síðu 13*

## Havnin tingstaður Føroyinga

Havnin var og er tingstaður Føroyinga. Eins og í dag savnaðist stór mannfjøld í Havn um Ólavssøkuna í miðøld eins og í 1600 og 1700 árunum. Hetta hevur Lucas Debes gjølliga lýst í bók síni frá 1673, og nøkur ár herfyri hevur Andras Mortensen lýst neyva sambandið millum Ólavsøkuna sum kirkjuliga hátíð og løgtingið.

## Í kirkju hvønn fyrrapart

Tingið varð sett á Ólavssøku í tinghúsinum og við til setanina vóru eisini allir landsins prestar. Hvønn dag, tingið síðan var saman, var guðstænasta í kirkjuni fyrrapart og tingfundur seinrapart. Prestarnir savnaðust eisini til fundar, og vóru har viðgjørd mál, ið skuldu verða avgjørd eftir kirkjurættinum ella kristinrættinum í miðøld. Seinasta dag, tingið var saman, vóru prestarnir aftur kallaðir í tinghúsið at verða við, tá tingið varð slitið.

## Gildi við oldurmanni

Enn ein stovnur hevur í 1600 árunum havt týdning í Ólavsøkuhaldinum og tingsiðunum, eitt gildi við oldurmanni á odda. Hetta gildi hevur staðið undir vernd av Ólavi heilaga, vil onkur halda. Bæði menn og kvinnur vóru limir í gildinum, sum tykist átøkt teimum gildum, sum vóru á bygd í Noregi í miðøld. Gildið helt til í tinghúsinum, sum eisini varð nevnt gildisskálin. Á veitsluni um kvøldið eftir tingslit vóru tað prestarnir og oldurmaðurin, sum høvdu høvuðsleiklutin í einum drykkjulag, hvørs røtur eru at finna í miðøld og longur aftur undan kristniboðanini.

## Samband millum ting og kirkju

At ting- og gildissiðirnir í 1600 árunum tá vóru elligamlir, er neyvan undarligt, men hvussu passar kirkjan inn í myndina?

Hóast einki lógarkrav var um kirkju í sambandi við tingstaðin, var tað vanligt í grannalondum okkara, at kirkja var á tingstaðnum og guðstænasta varð hildin í sambandi við tingið. Men bert á Føroya løgtingi var sambandið millum ting og kirkju so tætt, at guðstænasta varð hildin hvønn fyrrapart og tingfundir seinrapartar. Tað er einki sum bendir á, at Lucas Debes hevur hildið hesa skipan vera bert umleið 60 ára gamla, sum hon hevði verið, um fyrsta Havnar kirkja veruliga varð bygd í 1609. Tvørtur ímóti ber skipanin dám av at vera elligomul.

## Ovurstór kirkja í Havn

Tá kongur og fúti hansara í 1609 stíla fyri at byggja nýggja og ovurstóra Havnar kirkju, var tað neyvan havnarfólk, teir fremst hugsaðu um, hesar vanvirdu fæloysingar, sum myndugleikarnir speiskliga kallaðu landastrok og ullabiddarar. Heldur varð kirkjan fyrst og fremst bygd teirri stóru mannfjøld, sum á Ólavsøku leitaði til Havnar at søkja ting: tingmonnum, prestum, sýslumonnum, gildisbrøðrum, gildissystrum, fólki, ið vóru stevnd inn fyri tingið, fólki, ið bert fóru til handils o.s.fr., o.s.fr.

Kongur endurbygdi Havnar kirkju fyri at halda elligamlar kristiligar siðir í hevd. Havnar kirkja hevur tí helst verið annað og meir enn bert Havnar kirkja. Hon hevur kanska fremst av øllum verið tingkirkja Føroyinga.

** merkir svenskt ø við prikkum*


Nýtt Kall 200
Nú eisini við 200 ókeypis sms-boðum um mánaðin
Frá 1. desember hava vit gjørt fartelefonhald okkara, Kall 200, enn betri og bíligari. Umframt teir 200 ókeypis minuttirnar hvønn mánaða at nýta innanlanda, bjóða vit tær nú eisini 200 ókeypis sms-boð um mánaðin. Virði á teimum 200 sms-boðunum er 160 krónur, um tú rindar vanligan sms-takst*. Mánaðargjaldið fyri Kall 200 er 134,40 krónur. Minuttprísurin aftaná teir fyrstu 200 minuttirnar er einans 96 oyru** fyri samrøður í Føroyum. Um tú vilt hoyra meira um nýggja Kall 200 fartelefonhaldið við teimum 200 ókeypis minuttunum og teimum 200 ókeypis sms-boðum at nýta hvønn mánað, kanst tú ringja 20 20 20 og spyrja eftir einum av virkisrøktarum okkara.
Legg til merkis, at um tú hevur Kall 200 fartelefonhald frá okkum, koma tey 200 ókeypis sms-boðini av sær sjálvum á hald títt.
* Virkiskundar okkara fáa tó vanliga antin 10 ella 20% í avsláttri av listaprísinum, alt eftir, hvussu stór samlaða mánaðar-nýtslan hjá virkinum er.
** Prísurin er við 10% avsláttri. Um tú hinvegin fær 20% avsláttur er minutt-taksturin aftaná fyrstu 200 minuttirnar einans 73 oyru.
Allir prísirnir eru uttan meirvirðisgjald
TEAM85
Kall • Óðinshædd 2 • 100 Tórshavn • Tel 20 20 20
www.kall.fo
kall
20 20 20

… framhald frá síðu 21

til umbyggingina, síðani ráðini frá tjóðminnasavninum ikki vórðu fylgd.

Kanningar, sum seinni eru gjørdar, knýta á ongan hátt navn Dahlerups til Ólavskrkjuna, tá ið hon verður umbygd 1874.

Tiltikna tiltakið, sum sóknarfólkið skipaði fyri á sumri 1966, kastaði so mikið av sær, at fíggjarliga støðið til umbyggingina var fingið til vega.

## Kirkjan í Fámjin

Tá nýggj kirkja skuldi byggjast í Fámjin í 1875, var heitt á Guðbrand Sigurðsson um at standa fyri byggingini.

Nýggja kirkjan í Fámjin er á mangan hátt meinlík Ólavskirkjuni í Kirkjubø, sum varð bygd í 1874.



Fyrsta Merkið er at síggja í kirkjuni í Fámjin



Hon er úr gróti; veggirnir eru dupult lagaðir. Ovasta av eysturendanum, upp í roysnið, er úr tigulsteini. Veggirnir eru hvítir uttan og innan; upprunaliga pussaðir og kálkaðir, í dag málaðir.

### Jarn vindeygu í oddboga sniði

Á suðursíðuni eru fýra vindeygu, og á norðursíðuni inn til skrúðrúmið er eitt. Hesi eru øll í somu støðd og oddboga sniði. Tey eru gjørd úr jarni, so ovasti rúturin er í oddboga við krossi ovast.

Kirkjan er takt við fløgugróti, og klæddir við tí sama eru galvarnir yvir syllahædd við høgum spíri á.

Í kirkjutorninum eru lúkur at lata upp, tá ringt verður. Inn á loftið er sprossavindeyga í vesturendanum. Inngongdin er í vesturendanum. Har er tvíhurð

við lítlum vindeyga omanfyri, í sama sniði sum á loftinum, at lýsa innar í forkirkjuna. Forkirkjan er skilað frá við brósti úr viði, og tvíhurð er innar í kirkjuna. Omanfyri hurðina er gyltur krossur, og á vegginum er messingkistil við krossi á at lata pening í.

## Rúnarsteinur

Á gólvinum stendur steinur við rúnum á og samsvarandi latínskum bókstavum.

Úr forkirkjuni snýr trappan seg upp á loftið, har urgan stendur. Nøkur fá fólk fáa sitið á loftinum, haðani stigi er upp í tornið, har lemmur er at lata aftur.

Kirkjan er hvítmálað við bláum hválvi, ið er súðusmíðað. Í dag eru allir veggir innan klæddir við viði.

*Vindeyguni í Fámjins kirkju hava oddboga snið. Legg merki til krossin ovast í rútinum.*





## Guðbrandur Sigurðsson

Guðbrandur Sigurðsson var íslendingur. Hann kom til Føroya í 1862, og fekk stóra ávirkan á føroyska kirkjubygging.

Guðbrandur doyði í Føroyum 25. mai 1905 og er jarðaður í gamla kirkjugarðinum í Øravíkarlið. Eftir deyða hansara flutti konan og børnini aftur til Islands.

Gravsteinurin yvir Guðbrandi Sigurðsson er í gamla kirkjugarðinum í Øravíkarlíð.

Kelda: Bókaverkið Kirkjurnar í Føroyum.
Tekningar: J. P. Gregoriussen, arkitektur.

# Hvat gert tú við tínar pengar

Kundi tú hugsað tær at vita, hvørjar møguleikar tú hevur?
Kom inn til okkara og fá eitt prát. Í felag finna vit útav, hvørjar
íløgur hóska tær best. Tað er einfaldari, enn tú trýrt.



sansir.fo - 11/2005

Tel 35 15 00 · Fax 35 15 01 · www.kaupthing.fo

KAUPTHING


ALT INNAN VENTILATIÓN, HITA OG SANITET
TLF: 31 20 00
Maria Poulsen p/f
www.mariapoulsen.fo


El-amboð
til handverkaran?
Balslev
sjálvandi!
Paslode
makita
metabo
ELEKTRA BECKUM
Tel 31 11 22
www.balslev.fo

# Nevndarlimir og dagligur leiðari



## Kristian Eli Brimsvík

**Bústaður:** á Fløtti 14 A · Tórshavn · tlf. 31 64 32 og 23 48 02
Formaður í Havnar Handverkarafelag og nevdarlimur í Eftirlønargrunninum
**Føddur:** 27. januar 1958 · Útbúgvin skipssnikkari 1978
Arbeiðir á timburdeildini á Tórshavnar Skipasmiðju



## Danial Pauli Djurhuus

**Bústaður:** Vestmanna · tlf. 21 46 69 · tlf. 23 48 09
Næstformaður í Havnar Handverkarafelag og formaður í Landsfelag Handverkaranna
**Føddur:** 14. juni 1959 · Útbúgvin bygningssnikkari
Arbeiðir sum húsavørður hjá Dimmalætting



## Koos Kamminga

**Bústaður:** Heygsvegur 29 · Tórshavn · tlf. 31 01 54 og 26 05 36
Kassameistari í Havnar Handverkarafelag
**Føddur:** 15. august 1946 · Útbúgvin maskinistur 1963
Arbeiðir á Vatnverkinum hjá Tórshavnar kommunu



## Bjarni Pétursson

**Bústaður:** Heygsbreyt 18 · tlf. 21 23 58
Nevndarlimur í Havnar Handverkarafelag og nevndarlimur í Eftirlønargrunninum
**Føddur:** 3. mars 1942
Útbúgvin bilmekanikari 1965



## Sofus Joensen

**Bústaður:** Ovaragøta 70 · tlf. 31 68 49
Nevndarlimur í Havnar Handverkarafelag og formaður í Eftirlønargrunninum
**Føddur:** 31. juli 1956 · Útbúgvin elektrikari
Arbeiðir sum húsavørður á Lágargarði



## Petur Juul Jacobsen

**Bústaður:** Varðalág 5 · Tórshavn · tlf. 23 48 03
Dagligur leiðari í Havnar Handverkarafelag
**Føddur:** 26. september 1962 · Útbúgvin grannskoðari (merkonumur í grannskoðan) í 1996 og skrásettur grannskoðari í 2005

… framhald frá síðu 4

## Nýggir møguleikar

Eftir okkara fatan letur hendan avtalan upp fyri nýggjum møguleikum.

Nú fer at bera til at byggja skip í Føroyum, og føroyskir handverkarar kunnu aftur nýta sín førleika í slíkum byggiarbeiði.

Eisini kann hugsast at fólk kunnu koma í læru innan skipabygging.

Aðrir fakbólkar fara eisini at kenna ágóðan av hesum.

Føroysk virkir og fyritøkur fara eisini at kunna vera við, við sínum vørum og tænastum.

## Menn eru farnir til verka

Kjølurin til sypply-skipið er strektur. Byggiarbeiði er farið í gongd, og fyrstu pólendingarnir eru komnir til landið.

Við hesum er skjøtul settur á eitt nýtt tíðarskeið við nýggjum og spennandi møguleikum.

Okkara vón er, at grundarlag er skapt fyri nýggjum byggisáttmálum til gagns fyri hesa vinnu, handverksfakið innan økið, og at samfelagið – í aðrar mátar – fer at kenna fyrimun av hesum.

*Dánjal Pauli Djurhuus,*
*formaður í Landsfelag Handverkaranna*

Audi
SEAT
PORSCHE
Bilasølan
við Øssur Johannesen
Vegurin Langi · 188 Hoyvík · tlf. 31 53 54 · www.audi-vw.net

ALKA forsikring



# Få 103 års erfaring i store forsikrings-aftaler

ALKA forsikring blev skabt af de danske fagforeninger i 1903. Siden da har vi leveret store, kollektive forsikringsaftaler til fagforbund og store organisationer, også på Færøerne.

ALKA er anerkendt for sine kvalitetsforsikringer og gode kundeservice. I fire ud af de sidste fem år har Dansk Kunde Index kåret ALKA som forsikringsselskabet med de mest tilfredse og loyale kunder.

Kontakt os på tlf. +45 43 58 57 57 og hør mere om hvad vi kan tilbyde.

**ALKA - et anderledes forsikringsselskab**

ALKA er ikke sat i verden for at lave store overskud til vores ejere, men for at tilbyde kunderne de bedst mulige forsikringer til de lavest mulige priser.